**Mentamálaráðið**
*Mentamáladeildin*

# Lærugreinaráðgevi
## endurlýsing

**Starvið**
Í Mentamálaráðnum/Landsmiðstøðini eru nakrir ráðgevatímar leysir at søkja til setanar frá 1. januar 2004 ella skjótast gjørligt.

Ráðgevingin fevnir í fyrsta lagi um lærugreinina **føroyskt**, men eisini um eitt nú **skúlabyrjan og heimstaðarlæru**.

Samanlagt eru 10 lønartímar um vikuna at søkja (ein lønartími svarar til umleið 1¹/₂ fyrisitingartíma).

**Førleikakrøv**
Umsøkjarar eiga at hava hollan ástøðiligan kunnleika og starvsligar royndir í viðkomandi lærugrein og starvsøki, starvið fatar um. Væntað verður, at lærugreinaráðgevin hevur førleika í og er hugaður at nýta kt í ráðgevastarvinum.

**Setanar- og lønartreytir**
Lærugreinaráðgevar verða settir eftir avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag. Tann, ið settur verður, skal undirvísa írestandi tímarnar í skúlanum, har viðkomandi starvast dagliga.

**Starvslýsing**
Ein starvslýsing er galdandi fyri ráðgevastarvið. Eitt nú verður sagt:
- Ráðgevin skal í øllum lutum virka fyri einari námsligari menning í skúlanum
- Ráðgevin skal støðugt halda seg kunnugan við ta menning, sum er á námsliga, fakliga og tøkniliga økinum
- Ráðgeva viðvíkjandi undirvísingarmiðlum og arbeiðshættum í einstøku lærugreinunum

Lagt verður upp til eitt skipað samstarv millum ráðgevarnar, møguliga í tvørgreinaligum bólkum.

**Umsókn**
Umsóknir við prógvum o.ø. skulu verða Landsmiðstøðini, Hoyvíksvegi 72, Postrúm 3084, 110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi mikudagin 5. november 2003.

Gjøllari upplýsingar fáast frá stjóranum á Landsmiðstøðini, tlf. 318825.

**Mentamálaráðið og Landsmiðstøðin**

***Mentamálaráðið*** *hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harumframt hevur ráðið uppgávur, ið viðvíkja kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi.*
***Landsmiðstøðin*** *er tænastustovnur í undirvísingarverkinum. Landsmiðstøðin sýnir fram og lænir út undirvísingarmiðlar, hevur verkstaðarmøguleikar, hevur saman við Mentamálaráðnum eina lærugreinaráðgevaskipan og skipar fyri skeiðum við fakligum og námsligum innihaldi, sum binda saman tað ástøðiliga og tað verkliga.*

**Starv**

# Reingerð




Strandfaraskip Landsins søkja við hesum eftir einum fólkið til at gera reint niðri á farmastøðini.

**Uppgávurnar fevna um**
- skrivstovur
- toilettir
- gangir og onnur smáhølir

Nærri avtala verður gjørd um uppgávur og treytir, herundir arbeiðstíðir og løn.

**Umsóknir**
Áhugaði skulu senda umsókn til:

Strandfaraskip Landsins
att. Starvsfólkadeildin
Boks 88
FO-110 Tórshavn

Umsóknir skulu vera fyritøkuni í hendi í seinasta lagi 27. oktober 2003.

Um tú ynskir nærri upplýsingar, kanst tú venda tær til Heina á Borg, farmaflutningsleiðara, á tlf. 34 30 60 ella e-post: hab@ssl.fo

STRANDFARASKIP LANDSINS
www.ssl.fo · 34 30 30

REPROZ


CATERPILLAR®



442D RENNUGRAVARI
Fabriksnýggjur
Prísur uttan mvg. Kr. 498.000,-

HYDREMA

908ESD RENNUGRAVARI
Frá 1996 – 5750 tímar-renov... Seld



906B RENNUGRAVARI
Frá 1991 – 5800 tímar-renoverað
Prísur uttan mvg. Kr. 305.000,-

808 RENNUGRAVARI
Frá 1989 – 5940 tímar
Prísur uttan mvg. Kr. 150.000,-

806 RENNUGRAVARI
Frá 1989 – ca. 6000 tímar
Prísur uttan mvg. Kr. 225.000,-

*P/F ALMA*
*Maskinverkstaður & Smiðja*
Tlf. 31 58 90 Fax. 31 35 00
Mail: jan@alma.fo







# Programmfólkastørv
## í Sjónvarpi Føroya

**Í SvF eru hesi størv leys at søkja:** Eitt fast starv sum programmfólk. Eitt avloysarastarv sum programmfólk frá 1. januar til 15. august 2004.

**Uppgávur:** Programmfólkaarbeiðið umfatar alt virksemi innan programmøkið í SvF, tó verður í høvuðsheitum talan um tíðindi og aktuellar sendingar.
Arbeiðið er skipað í vaktir við skiftandi arbeiðstíðum.

**Førleikakrøv:** Útbúgving og royndir sum tíðindafólk, ella aðra viðkomandi útbúgving og arbeiðsroyndir. Vit vænta okkum harafturat, at tú kanst arbeiða sjálvstøðugt og hevur hollan kunnleika til føroysk samfelagsviðurskifti og til føroyskt mál.

**Løn og setanartreytir:** Løn sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið.

Umsóknir við prógvum, viðmælum og CV verða at senda til Sjónvarp Føroya, postboks 21, 110 Tórshavn, og skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin 3. november, kl. 13.00.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Sjónvarp Føroya, tlf. 340400, og tala við Mikkjal Helmsdal, stjóra.

svf
Sjónvarp Føroya, M.A. Winthersgøta 2, 100 Tórshavn

SISERO 351800

# Starv sum tøkningur
## í Sjónvarpi Føroya

Eitt starv sum tøkningur í Sjónvarpi Føroya er leyst at søkja.

**Uppgávur:** Hálva tíð við upptøkum, redigering v.m. í sambandi við sendingar SvF's og hálva tíð við projektering av nýggjum tøkniskipanum og meting/eftirmeting sum superbrúkari av nýggjari tøkni. Arbeiðið er skipað í vaktum við skiftandi arbeiðstíðum.

**Førleikakrøv:** Útbúgving sum miðlatøknimekanikari ella útbúgving og arbeiðsroyndir, ið svara til hetta. Hollar arbeiðsroyndir innan sjónvarpsframleiðslu, góður KT-kunnleiki, royndir við at projektera AV-tøkniskipanir og holl vitan um nýggjastu AV-tøknina.

**Løn og setanartreytir:** Løn sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið. Starvið verður at seta frá 1. januar 2004.

Umsóknir við prógvum, viðmælum og CV skulu sendast til Sjónvarp Føroya, postboks 21, 110 Tórshavn, og vera okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin 3. november kl. 13.00.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Sjónvarp Føroya, tlf. 340400, og tala við Mikkjal Helmsdal, stjóra.

svf
Sjónvarp Føroya, M.A. Winthersgøta 2, 100 Tórshavn

SISERO 351800

# Kunngerð
## um uttangarðsútskiftingarfund við Gjógv

Næsti útskiftingarfundur um býti av haganum, Dalur og Fløtur, matr. nr. 230, verður í samkomuhúsinum mikudagin 22. okt. 2003 kl. 10.00.

N. v.
Bjarni Hansen,
útsk. form.


***Arbeiðshandskar***
*til øll endamál - bæði á sjógvi og landi*
Beinleiðis frá framleiðara
**Landsins størsta úrval**
frá eingangshandskum til fóðraðar Japan-handskar
ADC-Heilsølan spf
Láarvegur 14 • 100 Tórshavn • Tel. 315828 • Fax 315893
adc@adc.fo
Sosialurin 311800


Sosialurin -tað loysir seg

# Vinnuøki á Sandvíkahjalla

Um nóg høgt boð fæst, er eitt vinnuøki á Sandvíkahjalla til sølu.

Talan er um eitt óbygt grundøki til støddar 4.478 m².

Sambært byggisamtyktini liggur grundøkið í umráði B 7, har loyvt er at byggja hús til stór vinnuvirki, verksmiðjur, goymslur og tílíkt og til tænastuvirksemi, ið hevur samband við hesi.

Vanligi servitutturin um at byggjast skal innan eitt ávíst áramál, og at ikki kann seljast víðari uttan at henda treyt er lokin, er ikki galdandi fyri hesa ogn.

Nærri fæst at vit við at venda sær til

**Óla Jákup Kristoffersen, adv.**
e-mail ojk@advlaw.fo ella
**Elin Svínoy**
e-mail els@advlaw.fo

# Grundøki Yviri við Strond



Um nóg høgt boð fæst, selja vit eitt grundøki, sum liggur beint norðanfyri Fiskimálaráðið Yviri við Strond.

Stykkið er óbygt, men partvíst planerað til parkeringsøki, hevur heitið matr. nr. 620 u og er til støddar uml. 1.400 m².

Sambært byggisamtyktini liggur stykkið í 2. grundumráði, sum er lagt til blandaða bústaðarog miðstaðarbygging.

Nærri fæst at vita við at venda sær til

**Óla Jákup Kristoffersen, adv.**
e-mail ojk@advlaw.fo ella
**Elin Svínoy**
e-mail els@advlaw.fo

Søkt verður eftir

## fólki til byggiarbeiði

**Sp/f Bygningstænastan**
v. Jógvan Joensen
Ring á tlf. 222771